# Fyrsti sigurin hjá manningini á Sílinum

**Eftir at tær á norðoyastevnu við einari læntari ár endaðu á fjórða plássinum, eydnaðist tað nýggju manningini á Sílinum fyri fyrstu ferð yvirhøvur at vinna á Fjarðastevnuni**

5–MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*



*Umskiftið í endastøðuni í genturóðrinum var stórt, og hesa ferð var munurin millum bátarnar ikki eins stórur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Undan norðoyastevnuni varð roknað við, at tær fóru at teljast millum favorittarnar. Men tað miseydnaðist fullkomuliga. Gull favorittarnir umborð á Sílinum endaðu á fjórða plássi.

Á Skálafjørðinum gekk alt upp í eina hægri eind. Genturnar umborð á Sílinum vunnu. Kappingin var ógvuliga tøtt. Fjarstøðan aftur til Blik, sum vann í Klaksvík, og Havfrúnna, var ikki stór. Men hon var nóg stór til, at genturnar umborð á Sílinum kundu fegnast um fyrsta sigurin nakrantíð, sum nakar av teimum hevur vunnið í kappróðri. Harvið syrgdu tær fyri, at Havnar Róðrarfelag aftur hesa ferð vann fýra av seks kappingum, sjálvt um Havnarbáturin hesa ferð varð ov stuttur.

– Vit vóru allar við 6–mannafarinum Víkingi í fjør. Eingin okkara hevði róð áður, og vit vóru ikki so illa nøgdar við, at vit endaðu á fimta plássinum í FM kappingini. Serliga ikki tá kvinnurnar umborð á nýggja Gongurólvi bara vóru eitt pláss frammanfyri okkum. Í vár fóru allar tær, sum í fjør vunnu allar róðrarnar við Sílinum, umborð á Gongurólv, og so valdu vit at taka okkum av at manna Sílið, sigur bátsformaðurin Marina Moraitis.

Einki aldursmark er fyri manningarnar á gentubátunum. Tá ið bátsformaðurin sigur, at tær allar vóru við til at manna 6–mannafarið Víking í fjør, spyrja vit, um tað so vil siga, at miðalaldurin umborð á Sílinum er rættuliga høgur, og svarið er, at hann er átjan ár.

### Ein ár brotnaði

Sílið varð mett sum favorittur undan norðoyastevnuni, men tær megnaðu ikki meiri enn fjórða plássið. Tað kann hugsast, at veðurlíkindini spældu inn. Men bátsformaðurin hevur tvær aðrar frágreiðingar, sum í hvussu so er eru partur av søguni um, at tað eydnaðist væl betri hesa ferð, enn tað gjørdi fyri fjúrtan døgum síðani:

– Tað ávirkaði heilt víst í Klaksvík, at vit noyddust at læna eina ár. Dreingirnir umborð á Sílinum brutu eina ár, tá ið teir hitaðu upp. Teir læntu eina ár umborð á Drekanum. Men Drekin luttók í gentukappingini, og so var neyðugt hjá okkum at fáa eina aðra ár til vega. Vit stríddust eina løtu, og so eydnaðist at læna eina ár í Klaksvík. Trupulleikin var, at hetta var ein ár, sum hoyrdi til rúmbekk. Okkum tørvaði eina ár til toftibekk, og tað er ikki heilt tað sama.

Hin frágreiðingin um, at tað royndist væl betri hjá gentunum umborð á Sílinum hesa ferð, enn tað gjørdi í Klaksvík, sigur bátsformaðurin vera hesa:

– Vit hildu okkum rógva í so seigan í Klaksvík. Undan Fjarðastevnuni rættaðu vit eitt sindur upp á rútmuna, og vit halda, at tað var ein av orsøkunum til, at tað hesa ferð royndist væl betur.

Blikur, sum vann í Klaksvík, var næstfremstur. Tá ið hálvt málið var rógvið, vóru argjagentur væl aftanfyri Havfrúnna úr Vestmanna, men tað eydnaðist teimum at taka Havfrúnna við einari stórari hálvari bátslongd. Sílið var eina lítla hálva bátslongd frammanfyri Blik. Manningin á Sílinum er henda: Rúna Jacobsen – Marina Moraitis, Barbara Jacobsen, Anna Høgnesen, Hildigunn Niclasen, Arndis Andreasen og Lív Gåsedal.

### Tíðirnar

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sílið | 05:20:04 |
| 2. | Blikur | 05:21:11 |
| 3. | Havfrúgvin | 05:23:06 |
| 4. | Drekin | 05:25:06 |
| 5. | Ørnin | 05:27:10 |
| 6. | Firvaldur | 05:28:22 |
| 7. | Junkarin | 05:31:07 |
| 8. | Fípan Fagra | 05:33:04 |
| 9. | Hulda | 05:47:10 |
| 10. | Kollur | 05:48:16 |
| 11. | Tjaldrið | 06:02:00 |

# Gongurólvur enn eina ferð

**Páll Fanga kvinnurnar góvu ábendingar um, at tær ætla at bjóða nógv vinnandi manningini umborð á bátinum hjá Havnar Róðrarfelag av**

6–MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*



*Gongurólvur vann annan róðurin á rað, men hesa ferð var kappingin frá Páll Fanga nakað væl hægri, enn hon var seinast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað gekk, sum tað gjørdi í fyrstu kappingini. Kvinnurnar umborð á Gongurólvi vóru enn eina ferð fremstar á mál. Manningin er henda, roknað frá stýrimanni og um lærbekk og fram á toftina: Magna í Stórustovu – Inga Thorkildshøj, Karina Ottosen, Irdi Debes, Sólrun Michaelsen, Beinta Lamhauge og Hanna Joensen.

Hetta er ikk hvør sum helst manning. Í fjør vunnu tær allar róðrarnar við 5–mannafarinum Sílinum, sum var sera sannførandi FM vinnari. Nú manna tær 6–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag, og tær halda fram at verja æruna hjá mest vinnandi róðrarfelagnum í landinum. Bæði tá ið tað ræður um søguligu sigrarnar, og tá ið tað ræður um kappingarárið í ár.

Men hesa ferð varð sigurin ikki so lætt vunnin, sum hann var tað í Klaksvík. Lómur av Argjum tóktist fáa besta startin, og Páll Fangi úr Klaksvík bjóðaði seg skjótt fram sum evni til fremsta plássið.

Gongurólvur var skjótt millum teir fremstu, men tað gekk ein væl longri løta hesa ferð, áðrenn tær tóku oddasessin, enn tað gjørdi á norðoyastevnu. Páll Fangi var eina bátslongd frammanfyri, og klaksvíks kvinnurnar vóru rættuliga treiskar. Gongurólvur bjóðaði tvær ferðir av, og Páll Fangi svaraði tvær ferðir aftur, áðrenn tað loksins eydnaðist Gongurólvi at leggja seg á odda.

Tá var bara ein triðingur eftir av túsund metra teininum. Næstu lítlu løtuna tóktist tað sum um, at tær á Páll Fanga skuldu sleppa, men so mentust tær aftur, og tað var ikki fyrrenn á sjálvum málinum, at tað varð greitt, at Gongurólvur hevði vunnið. Munurin aftur til Páll Fanga, sum var tann fyrri av teimum báðum fremstu at fara undir endaspurtin, var tá ein stórur skutur ella ein lítil hálv bátslongd.

Lómur misti skjótt í kappingini um oddasessin. Tær á Argjum vóru klárt nummar trý. Men munurin fram til teir báðar fremstu bátarnar var so mikið stórur, at tað er ilt at ímynda sær, at aðrir bátar fara at verða við í kappingini um fremsta plássið í Kollafirði enn Gongurólvur og Páll Fangi. Úrslitið á Fjarðastevnuni kundi bent á, at tann kappingin kann gerast sera áhugaverd og spennandi.

### Tíðirnar

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Gongurólvur | 05:05:15 |
| 2. | Páll Fangi | 05:06:10 |
| 3. | Lómur | 05:11:23 |
| 4. | Smyril | 05:17:25 |
| 5. | Fortuna | 05:27:18 |
| 6. | Fuglfirðingur | 05:35:14 |



# Jákup spøkir í Farum

**Heimasíðan, bold.dk, skrivar, at Christian Andersen og Farum hava sýnt áhuga fyri føroyska landsliðsmálverjanum**

ÚTISETI
*Jákup Mørk*



*Jákup Mikkelsen sigst nú vera ávegis aftur til danskan fótbólt. Heitasta navnið í løtuni tykist vera Farum, sum helst missir báðar málverjarnar í superliguhópinum í summar*

Sum vit áður hava nevnt, so gongur sáttmálin millum Jákup Mikkelsen og norska felag hansara, Molde, út 1. juli.

Hetta merkir, at Jákup Mikkelsen eftir hetta er fríttstillaður, soleiðis at hann – um møguleikar eru til tess – frítt kann fara til tað felag, sum honum lystir.

### Gamalt fríggjarí

Sum vant í slíkum støðum, so verður dúgliga gitt, hvat nýtt felag talan kann verða um. Sjálvur hevur Jákup Mikkelsen ikki vilja sagt nakað sum helst um, hvar hann fer at verja málið eftir summarstegðin, men ábendingar hava áður verið um, at hann fer aftur til danskan fótbólt.

Norsk bløð skriva nú, at eitt av feløgunum, sum hava sýnt konkretan áhuga í Jákupi, er danska superligufelagið, Farum. Hetta er eisini eitt av teimum feløgum, sum vóru søgd at hava áhuga í Jákupi, tá hann fyri tveimum árum síðani skifti til Molde, so áhugin kann á ongan hátt sigast at vera nýggjur.

Støðan í Farum er í løtuni tann, at felagið í summar ivaleyst má siga farvæl við báðar málverjarnar í hópinum, og at felagið tí hevur tørv á nýggjum málverja. Enn hevur felagið ikki givið til kennar, hvørji nøvn teir hava í kikaranum, men sambært bold.dk eru heitastu evnini Jákup Mikkelsen og so Brian Jensen, sum áður hevur vart málið hjá West Bromwich Albion, tá hesir spældu í næst bestu ensku deildini.

Danska kappingin endar komandi vikuskifti, og ikki fyrr enn tá ætlar leiðslan í Farum at fara í holt við at leita eftir nýggjum leikarum, verður sagt. Farum er í løtuni á einum sera óvæntaðum fjórða plássi í donsku superliguni, og hava sostatt góðar møguleikar at sleppa út í Europa at kappast í heyst.

Sambært leiðsluni í Molde, so er talan ikki um nakra ónøgd, nú teir lata Jákup Mikkelsen fara.

- Eg vil gjarna undirstrika, at vit eru sera væl nøgdir við avrikini hjá Jákupi í felagi okkara. Hann hevur prógvað, at hann er ein góður málverji – eisini í altjóða dystum. Í dystinum hjá Føroyum móti Týsklandi var hann jú besti maður á vøllinum, sigur ítróttarstjórin í Molde, Bertil Stranden.

# Einkultstartur á Sundalagsstevnuni

**Eftir at hava súkklað býarkoyring á Norðoyarstevnu, 100 km samlaðan start á Eystanstevnu, fara kappsúkklararnir at súkkla einkultstart á Sundalagsstevnuni í Kollafirði**

KAPPSÚKKLING:
*tíðindaskriv*



*Eftir at talan hevur verið um vanliga kappsúkkling hinar stevnurnar, verður talan um einkultstart á Sundalagsstevnuni. Nakað sum eisini verður rópt sannleikans tími*

Tá súkklaður verður einkultstartur, verða ein og ein súkklari sendur avstað í senn, við tveimum minuttum ímillum hvønn, soleiðis at hvør súkklari koyrir sín egna túr. Tá so allir eru komnir á mál, sæst hvør hevur brúkt minst tíð um teinin og er vinnari av kappingini. Einkultstartur verður eisini róptur »sannleikans tími«, tí har sæst hvør veruliga hevur sterkastu beinini. Taktikkur, sum verður brúktur í »vanligum« súkklukappingum, kann snøgt sagt ikki brúkast í einkultstarti.

Súkklað verður úr Kollafirði norður móti Ljósáum og aftur til Kollafjarðar. Hetta eru umleið 45 km. Hesin teinurin svarar til teinin, sum landsliðssúkklararnir fara at súkkla á oyggjaleikunum sunnudagin 29.06.2003.

Á undanfarnu stevnum hevur Gunnar Dahl-Olsen verið nær um einaráðandi. Honum á baki koma Sverri Mohr Edvinsson og Eli Christiansen. Tað er einki at ivast í at Gunnar er besta boðið upp á vinnara á Sundalagsstevnuni. Umframt kendu kappsúkklararnar, verður eisini roknað við, at fleiri av teimum, ið íðka triatlon, fara at verða við, tí einkultstartur er ein partur av triatlon.

Unglingarnir súkkla eisini einkultstart, tó at teirra teinur er einar 22 km. Teir súkkla úr Kollafirði og venda við Áir og súkkla so aftur til Kollafjarðar. Her stendur kappingin um gullheiðursmerki helst millum Hans Krosstein og Berg Johansen. Fyri at verða við í unglingakappingini skal tú verða 15 til 18 ár.

Annars eru øll vælkomin at royna seg. Einasta treyt er allir luttakarar eru í súkkluhjálmi. Kappingin byrjar klokkan 11:00, málið er á landsvegnum við kirkjuna í Kollafirði, tilmelding er á staðnum.

### Barnasúkkling

Eins og á undanfarnu stevnunum, skipar Tórshavnar Súkklufelag fyri súkklukapping millum børn. Hetta, saman við regluligari venjing av ungum súkklarum, er ein liður í at menna súkkling í Føroyum. Og ikki kann sigast annað enn at framgongd er á hóma. Tað eru fleiri og fleiri børn sum velja sær súkkling sum høvuðsítróttargrein. Hesi eru so við runt um á stevnunum og kappast móti hvør øðrum.

Súkklufelagið vónar at fleiri børn melda seg til kappingina fyri at royna, hvussu stuttligt tað er at súkkla kapp. Tað einasta, sum krevst er, at tú hevur eina súkklu og brúkar hjálm. Eini góð ráð eru at smyrja ketuna og kannað um nokk av luft er í dekkunum áðrenn tú kemur til kapping.

Bólkarnir í barnasúkklukappingini eru: 1. bólkur 6 til 8 ár, 2. bólkur 9 til 11 ár og 3. bólkur 12 til 14 ár. Gentur og dreingir kappast í hvør sínum bólki.

Kappingin byrjar klokkan 13:00, málið er við kirkjuna í Kollafirði, tilmelding er á staðnum. Eftir kappingina bjóðar Føroya Bjór sodavatn til luttakararnar.